# Bestu umstøður til ítróttarfólkið




*Ætlaða ítróttarøkið kemur helst at liggja millum landsvegin og fótbóltsvøllin í Sarpugeri. – Bæði málini hava skund, sigur Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri í Gøtu (Innsett mynd)*

*Myndir: Jonhard Hammer*

**Grót úr Gøtu kann nýtast til annað enn festivalar. Bygdarráðið í Gøtu hevur samtykt, at grótið frá handilsdeplinum í Gøtudali skal nýtast til gerð av ítróttarøki í Sarpugerði. Tey hava m.a. kannað umstøðurnar hjá báðum havnarfeløgunum**

ÍTRÓTTARØKI
*Snorri Brend*

**Gøta:** Í hesum døgum verður grundarlagið lagt undir ta stóru ætlanina við at gera stóra handilsdepilin í Gøtudali.

Arbeiðið er farið í gongd við planeringini, og verður miðað eftir at fyrstu viðskiftafólkini kunnu avgreiða síni ørindi her seint á heysti komandi ár.

Nógva grótið frá hesi ætlanini er ikki ætlanin at lata fara av bygdini. Tað skal hinvegin nýtast til eina aðra stóra ætlan hjá Gøtu kommunu, nevniliga at gera heimavøllin hjá GÍ búnan til krøvini hjá UEFA.

Hesi krøv fevna m.a. um, at vøllirnir skulu hava áskoðaraskýli til í minsta lagi 320 sitandi áskoðarar. Til hetta krevst m.a. grót, og hetta grótið skal bert flytast fáa 100 metrar longur oman í dalin.

Á henda hátt fær kommunan loyst tvey mál í einum!

## Skjót loysn

Á bygdaráðsfundi í Gøtu í gjárkvøldið varð tosað um hesa ætlanina við fótbóltsvøllin í Sarpugerði, har GÍ spælir sínar heimadystir.

Ætlanin er at gera økið kring fótbóltsvøllin til eitt ítróttarøki, og er ein fyrireikingarbólkur nú settur at koma við uppskoti um, hvussu henda ætlanin skal fremjast í verki.

Í bólkinum eru limir úr teknisku umsitingini hjá bygdaráðnum, eins og limir úr trivnaðarnevndini, teknisku nevnd og sjálvandi fíggjarnevndini.

Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri sigur, at bólkurin hevur fingið nakra tíðarfreist fyri at lata inn álit í málinum.

– Men ætlanin er kortini at bólkurin skal arbeiða skjótt, sigur hann við Sosialin.

Enn er ikki greitt, hvat hetta kemur at kosta. Men, sum borgarstjórin tekur til: – Tað fer at kosta nakrar milliónir!

## Góðar umstøður

Sambært nýggju krøvunum til fótbóltin skal ein góðkendur heimavøllur hava eitt skýli, har omanfyri 300 áskoðarar kunnu sita undir taki.

Á Gøtu hava teir arbeitt við hesum málinum í eina tíð, og hava m.a. verið og hugt eftir felagshúsunum hjá báðum havnarfeløgunum, HB og B36.

Ætlanin er at nýggja ítróttarhúsið skal hava góðar umstøður til ítróttarfólkið, eins og ein salur skal kunna nýtast til ymisk endamál.

Óhugsandi er ikki, at bygningurin kemur at liggja millum vøllin og landsvegin. Enn eru kortini ikki øll loyvini fingin til vega í hesum sambandi.

Tað skilst tó á borgarstjóranum at málið hevur skund: Í fyrsta lagi, tí UEFA-krøvini koma í gildi komandi ár.

Í øðrum lagi gongur arbeiðið við at fyrireika handilsdepilin sera skjótt. Tí er neyðugt at kommunan er til reiðar við sínum parti, soleiðis at arbeiðið við handilsdeplinum ikki verður tarnað.

# Lindin senda alt samdøgrið

**Mánadagin 4. september verður dagurin, tá kristna útvarpsrásin Lindin byrjar at senda alt samdøgrið sjey dagar um vikuna**

ÚTVARP
*Snorri Brend*

**Havn:** Í sendingum teirra í seinastuni hava teir víst á hesa øktu senditíðina, men annars hevur ikki verið so nógv sagt um, hvat teir ætla at víðka hesa við.

Kortini skilst, at ætlanin er at hava eina morgunsending á skránni. Enn er ikki avgjørt hvat heiti henda sending skal hava. Í hesum sambandi verður skipað fyri eini kapping, har lurtararnir kunnu koma við uppskotum um, hvussu henda sendingin skal eita. Ein vinningur verður latin besta uppskotinum.

Annars er hetta ikki fyrstu ferð, at føroyskar útvarpsrásir senda alt samdøgrið. Í roynd og veru er hetta hent áður í tveimum umførum: Útvarpsrásin Atlantic Radio sendi alt samdøgrið, frá mai til oktober í 1999, og Rás 2, sum byrjaði at senda tann 14. desember 1999 sendi ta fyrstu tíðina eisini 24 tímar um samdøgrið.

Lindin er ein kristilig útvarpsrás, sum ikki er heft at nakrari ávísari samkomu. Nevndin í rásini er mannað við limum frá ymiskum samkomum, og byrjaði at senda í januar mánaði 2000.

Rásin verður fíggjað við stuðli frá fólki. Íalt eru omanfyri 60 sjálvboðin fólk, sum á einhvønn hátt hava tilmnýti til Lindina.

STUTT SAGT

## Flestu óhappini henda kl. 17:30

**Ferðsla:** Í fjør hendu 361 ferðsluóhapp á landsvegum og 1061 á kommunalum vegum.

Hetta vísir ein uppgerð sum Landsverk hevur gjørt fyri ferðsluna í 2005.

Í hesum sambandi er eisini gjørt eitt yvirlit yvir tímabýtið í hesum ferðsluóhappum. Ikki óvæntað henda flestu óhappini um tað mundið, tá fólk eru á veg til hús eftir loknan arbeiðsdag.

Serliga um hálvgumsekstíðina er vandamikið at ferðast á føroysku vegunum, tí tað er hesa tíðina at flestu óhappini henda.

Tíbetur kann ein staðfesta, at talið av óhappum eru fækkað seinasta árið, men enn er kortini nakað ávegis til at røkka eini nullhugsjón í ferðsluni.

**sb.**

## Fáa alt at vita um samanleggingina



*Leirvíkingar fáa nú kunning um avleiðingarnar av eini samanlegging við grannakommununa í Gøtu*

**Gøta/Leirvík:** Leygardagin 9. september verður fólkaatkvøða um, hvørt borgararnir í Leirvík og Gøtu stuðla uppskotinum um samanlegging teirra millum.

Nakað av kunning hevur verið um hetta málið, men nú verður av álvara farið undir at greiða fólki frá, hvat avtalan og samstarvið innibera í framtíðini. Í hesum sambandi verður skipað fyri almennum fundum fyri borgarunum í báðum kommununum.

Fyrsti fundurin verður hóskvøldið í Losjuni í Gøtu og seinni fundurin týskvøldið í komandi viku í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Uppskotið til sáttmála um kommunusamanlegging liggur á heimasíðunum hjá báðum kommununum, men verður eisini borið í hvørt hús í báðum kommunum.

**sb.**

## Funnu áhugaverdar lutir frá gamlari tíð

**Vestmanna:** Fornfrøðingar eru nú aftur farnir til arbeiðis við útgravingum á einum staði tey kalla Úti á Toft.

Vestmanna Kommuna hevur ætlan um at byggja røktarheim á økinum, og tí var neyðugt frammanundan at finna útav, hvat leivdirnar umfataðu, soleiðis at hesar kundu verða loystar úr friðing, áðrenn ein møgulig bygging byrjaði.

– Enn er komið stutt ávegis, skrivar heimasíðan hjá Vestmanna kommunu. Tann fyrsta leivdin, sum grivin varð niður á, verður mett at verða av einum úthúsum, sum seinni í tíðini eru bygd omanyvir leivdir, sum eru uppaftur eldri.

Tó at stutt er komið ávegis, hava fornfrøðingarnir longu funnið onkrar áhugaverdar lutir m.a. ein fitistein. Fitisteinur finst ikki í Føroyum, og lutir úr fitisteini verða vanliga settir í samband við víkingatíðina. Fornfrøðingarnir løgdu tó dent á, at enn er alt ov tíðliga at siga, frá hvørjum tíðarskeiði luturin stavar.

**sb.**